SKÚLIN Á FOSSÁNESI
FOSSÁVEGUR 27 · 730 NORÐDEPIL

## Starv í Skúlanum á Fossánesi

- Eitt lærarastarv er leyst at søkja
- Starvið er tíðaravmarkað frá 1. des. 2009 til 30. juni 2010
- Lærugreinir: rokning, danskt, landalæra, enskt, fimleik dreingir

**Tann ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- Vera stundislig/ur og nærløgd/lagdur

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður í starv, skal hava læraraútbúgving.

**Løn:**
Lønt verður sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lørnarflokkunum 18.1 – 29.2

Umsóknir við c.v., og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. november klokkan 12:00

Fleiri upplýsningar um starvið fært tú við at venda tær til skúlan á tlf. 452120 ella 223913



*Eitt sindur hugnaligari...*

Hvat við at forkela teg sjálvan ella gleða onkran annan?

Tær góðu umstøðurnar kunnu vit bjóða tær.

Royn Luddastovu í Leynum ella Bakkastovu við Ljósá.

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**
**www.wedding.fo**
**sí undir »veitarar« og »brúðarnátt«**

## Leiðari til Sosialu Deild hjá Porkeris- og Vágs Kommunu

**Starvið**
Leiðarin kemur at hava ábyrgd av allari fyrisiting av deildini og barnaverndarmálum hjá Porkeris- og Vágs kommunu.

Somuleiðis málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuna eru ella verða løgd til kommunurnar.

Leiðarin verður skrivari og ráðgevi hjá sosislu nevnd hjá Vágs kommunu, og ráðgevi og málsviðgerði hjá Porkeris kommunu.

Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystur, heilsusystur, NSR Suður, dagstovnar, kommunalu dagrøktina og landsmyndugleikar

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur tú aðra hóskandi sosiala ella í minsta lagið miðallanga útbúgving, innan heilsu-, og almanna- ella skúlaverkið, hevur tú hug til sosialt arbeiði og hevur góðar samstarvseginleikar, dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ynskir at gera mun, so er tað tær vit leita eftir.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. januar 2010.

Starvið verður tíðaravmarkað til 2 ár.

Arbeiðið er fulla tíð og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Kirstin Strøm Bech, stýrisformann tlf.73 30 04.

Umsóknin við prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til Porkeris kommunu, við Á 8, 950 Porkeri í seinasta lagi 25. november 2009 kl. 12.00

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er: Børkuvegur
mánadag-hósdag frá kl. 9-16 620 Runavík
fríggjadag frá kl. 9-12 Tlf. 448480

**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**

## Søla av »goymslubygningi« á havnarøkinum í Fuglafirði

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið niðan fyri standandi ogn, sum bygd er á matr. nr. 239n á havnarøkinum í Fuglafirði, til sølu, hetta sambært § 1 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Talan er um**
- Ein goymslubygning bygdur á leigugrund, sum sambært uppmálinum er 477 fermetrar til víddar og sum seldur verður í tí standi, hann ídag stendur í.
- Bygningurin er bygdur á alt grundøkið.

Møgulig áhugað verður biðin um at seta seg í samband við Pætur Joensen, býarverkfrøðing á telefon 737705, Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702 ella Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777.

Ognin verður lýst til sølu við teirri treyt, at boð undir kr. 700.000,00 ongan áhuga hava, og at kommununi stendur frítt av velja millum innkomin tilboð ella einki at taka, sí § 6 í kunngerðini.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. november 2009 kl. 10.00.

Innkomin tilboð verða viðgjørd í trúnaði, til ognin er seld.

*Fuglafjørður 04. november 2009*
**Fuglafjarðar býráð**

TVØROYRAR KOMMUNA

## SOSIALDEILDARLEIÐARI TIL TVØROYRAR KOMMUNU

Tvøroyrar kommuna sóknast eftir ein dugnaligum leiðara til sosialu deild. Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála við viðkommandi fakfeløg.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Susanne Madsen á tlf. 611085 ella við telduposti til susanne@tvoroyri.fo. Á www.tvoroyri.fo sæst eisini starvslýsingin og ein nærri útgreining av starvinum.